FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## SØLA AV SETHÚSUM "LUFFUSTOVA" Í FUGLAFIRÐI

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið sethúsini á matr. nr. 204a á Norður í Gerði 9 í Fuglafirði til sølu, hetta sambært § 1 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

Talan er um Luffustovu, sum er fyrrverandi eldrasambýli, sum eisini hevur verið nýtt sum dagtilhald og spælistovu, í kjallara-, stovu- og loftshædd umleið 220 fermetrar til víddar, og verður ognin seld saman við grundøkinum 438 fermetrar til víddar.

Møgulig áhugað verður biðin um at seta seg í samband við Pætur Joensen, býarverkfrøðing ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737700.

Ognin verður lýst til sølu við teirri treyt, at kommununi stendur frítt av velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. juli 2008 kl. 15.00.

*Fuglafjørður, tann 18. juni 2008*

***Fuglafjarðar býráð***

---

Runavíkar Kommuna

## Tilboð uppá skúlabarnaflutning

Skúlabarnakoyringin millum Skálafjørð/Skála og Svimjihylin á Strondum frá 18/8-2008 at rokna, verður við hesum boðin út.

Talan er um flutning av næmingum millum Skálafjørð/Fløtur og skúlan á Skála og til svimjing á Strondum. Bussurin skal kunna taka 25-30 næmingar í senn.

Eisini er talan um flutning av næmingum við serligum tørvi millum Skála og skúlan í Runavík.

Útbjóðingartilfar við upplýsingum um leiðir og treytir annars fæst á kommunuskrivstovuni.

Tilboð, ið skulu verða skrivlig, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 1. juli 2008.

Fyrispurningar kunnu setast Runavíkar kommunu á tlf. 417000 ella við t-posti til runavik@runavik.fo

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · 600 Saltangará

---

## Ped. stuðul í Stranda skúla

Søkt verður eftir 1 stuðli at arbeiða alt skúlaárið 2008/2009.

Einum stuðli til næming í 1. flokki 22 tímar um vikuna.

**Søkt verður eftir stuðli, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Førleikakrøv:**
Tann, ið verður settur í starv, skal helst hava námsfrøðiliga útbúgving ella samsvarandi førleika. Fyrimunur er eisini, um umsøkjarin hevur royndir at arbeiða við næmingum við serligum tørvi.

Um umsøkjari við námsfrøðiligari útbúgving ikki søkir, kann hjálparfolk verða sett í starv.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum,

Hans Petur Jacobsen,
Strandatún 17,
490 Strendur,

í hendi **í seinasta lagi mikudagin 4. juli 2008 kl. 16.00.**

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til skúlastjóran, Hans Petur Jacobsen, tlf. 474042 ella tlf. 232740.

**Stranda skúli** hevur komandi skúlár um 200 næmingar og um 23 lærarar. Tú kanst lesa meiri um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/str

---

RUNAVÍKAR kommunuskúli
Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

## Størv sum pedagogiskir stuðlar í Runavíkar kommunuskúla

Til skúlaárið 2007/08 (1. august 2007 til 30. juni 2008) verður søkt eftir 10 pedagogiskum stuðulsfólkum (2 við 28 tímum um vikuna, 1 við 26 tímum um vikuna, 6 við 20 tímum um vikuna, 1 við 18 um vikuna) til næmingar við serligum tørvi.

Fyrimun hava umsøkjarar við royndum í mennandi stuðulsarbeiði og við viðkomandi útbúgvingum. Eisini er tað ein fyrimunur at duga nakað av teknmáli.

Løn samb. sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Vit vænta, at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Umsóknir**
Umsóknir við møguligum prógvum, c.v. og ummælum skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 04. juli 2008, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið frá Ásmund Lamhauge, skúlastjóra á tlf. 447331 & 217331 ella Duritu P. Joensen, varaskúlastjóra á tlf. 447331 & 221363.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur komandi skúlaár um 430 næmingar og um 50 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

---

umhvørvisstovan

## KUNNGERÐ
### um uttangarðsútskiftingarfund við Gjógv

Eftir løgtingslóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund

**hósdagin 26. juni 2008 kl. 10.00**

í bygdarhúsinum við Gjógv.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum
**Fyri oman Rætt.**

**Nevndarlimir eru:**
Marita í Brekkunum, Hósvík
Jákup Skoradal, Norðoyri

N.v.

Arnold Thomassen
útsk.form.

---

umhvørvisstovan

## KUNNGERÐ
### um uttangarðsútskiftingarfund í Húsavík

Eftir løgtingslóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund

**mikudagin 25. juni 2008 kl. 10.00**

í Ungmannafelgashúsinum í Húsavík.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum ***Innarihagi, Eystaripartur.***

**Nevndarlimir eru:**
Marita í Brekkunum, Hósvík
Jákup Skoradal, Norðoyri

N.v.
**Arnold Thomassen**
útsk.form.